# i Summar Festivalurin 2009

## Atgongd til festivalin
Fyri at sleppa inn á festivaløkið, skalt tú hava eitt armband frá Summar Festivalinum á handliðnum. Atgongumerki til Summar Festivalin kunnu býtast um við armbond á ávísum støðum áðrenn festivalin og við inngongdina til festivalin.

## Armbond
Atgongumerkini til Summar Festivalin skulu skiftast um við armbond, áðrenn tað ber til at sleppa inn á festivaløkið.
Fram til og við mikudagin ber til at fáa armbond uppá á deildunum hjá Norðoya Sparikassa í Klaksvík, Runavík og í Havn. Tað ber eisini til at fáa armbond uppá í Telebúðini í Klaksvík og í klædnahandlinum JAP.
Og tá festivalurin byrjar, ber eisini til at fáa armbond við høvuðsinngongdirnar til festivalin.

## Bátar
Onki er sum í egnum báti at stevna inn í vágna og vita sær at nakrir góðir dagar eru fyri stavn.
Skipað verður soleiðis fyri at heilt nógvir bátar kunnu liggja við bryggja í Klaksvík meðan festivalurin er. Treytin fyri góðum bátaplássi er, at boðað verður frá í góðari tíð. Klaksvík er frá náttúrunar hond ein trygg og góð havn og um veðrið verður til vildar, so kann Summarfestivalurin eisini gerast ein stór og væleydnað bátastevna við livandi tónleiki á dekkunum og bryggjudansi.

## Brandlið
Klaksvíkar Sløkkilið er til staðar á festivaløkinum, og væl útgjørd brandstøð er eisini í býnum.

## Bráðfeingishjálp
Hevur tú tørv á bráfeingishjálp, ring 112 og boða frá.

## Burturkast
Heitt verður á festivalgestir um at fara væl við festivaløkinum. Ruskíløt verða sett upp kring festivaløkið, og heitt verður á gestirnar at koyra burturkast í hesi ruskíløt.

## Burturmist
Um tit finna okkurt, sum er gloymt ella mist, kunnu tit lata tað til Kunningardiskin á festivaløkinum. Fólk, sum hava mist okkurt burtur, kunnu spyrja eftir tí í Kunningardiskinum. Lutir, sum verða lætnir til Kunningardiskin, men ikki verða heintaðir á festivalinum, verða lætnir Politistøðini í Klaksvík eftir festivalin.

## Eftirlit
Summar Festivalurin hevur eftirlit við inngongdina og inni á festivaløkinum. Óhóskandi atburður kann hava við sær, at fólk verða burturvíst av festivaløkinum.

## Ferðsla
Miðbýurin í Klaksvík verður lutvíst stongdur fyri ferðslu, meðan Summar Festivalurin verður hildin. Tí kann tað taka longri tíð enn vanligt at koma runt í býnum. Heitt verður á klaksvíkingar um at lata bilin standa heima og ganga á festivalin. Tað fer at lætta um trýstið á vegnum og á parkeringsplássini kring festivaløkið.

## Festivalleiðsla
Tú kanst koma í samband við festivalleiðsluna við at senda teldupost til summarfestival@gmail.com

## Flags
Tað ber til at hyggja eftir skránni til Summar Festivalinum umvegis fartelefonina. Far inn á Flags og vel Summar Festivalin. Har kanst tú so trýsta á skránna fyri teir ymsu dagarnar. So líkamikið um tú ert staddur mitt á Vágsbøi, á torginum, lítla húsinum ella heima, so kanst tú altíð sláa skránna til Summar Festivalin upp á fartelefonini.

## Fløskur
Tað er ikki loyvt at hava fløskur ella eingangsíløt við sær inn á festivaløkið. Hetta forboð umfatar alt slag av fløskum og íløtum.

## Fototól og kamera
Digital fototól og kamera til privat brúk og fartelefonir við myndatóli kunnu brúkast á festivaløkinum. Professionell foto – og kameraútgerð kann bert takast inn á festivaløkið við loyvi frá festivalleiðsluni. Send umsókn til summarfestival@gmail.com

## Gisting
Nógvir møguleikar eru at gista í Norðoyggjum, meðan Summar Festivalurin er. Gistingarhús, summarhús, tjaldingarpláss, campingøki og bátapláss. Set teg í samband við Norðoya Kunningarstovu, um tú vilt vita meira um gistingarmøguleikar á Summar Festivalinum.

## Gjaldskort
Gjaldskort kunnu brúkast á fleiri sølu- og matstøðum á festivaløkinum. Norðoya Sparikassi hevur sjálvtøku á festivaløkinum, og aðrar sjálvtøkur eru eisini í nánd av festivalinum.

## Húsvognar
Tað er vorðið alsamt meira vanligt at fólk ferðast uttanlands og í egnum landi við einum húsvogni afturúr bilinum. Býurin tekur væl ímóti festivalgestum, sum hava valt hugnaligu loysnina at gista undir egnum taki meðan Summarfestivalurin er. Húsvognar fáa umvegis Kunningarstovuna í Klaksvík ávíst økið í miðbýnum í Klaksvík, sum eisini syrgir fyri at vognarnir verða íbundnir, fáa streym og atgongd til vatn og wc.

## Inngongd til festivalin
Tvær høvuðsinngongdir eru til Summar Festivalin. Onnur er við Norðoya Sparikassa, og hin er við Posthúsið. Við hesar inngongdin kunnu atgongumerki býtast um við armbond.

## Kunningardiskur
Summar Festivalurin hevur serligan Kunningardisk á festivaløkinum, sum fólk kunnu venda sær til, um tey hava eitthvørt ivamál viðvíkjandi festivalinum. Eisini kunnu funnir lutir latast Kunningardiskinum.

## Løgregla
Løgreglan er til staðar á festivaløkinum, og løgreglustøð liggur beint við festivaløkið (sí kort)

## Matsøla
Ymsar matsølur verða á festivaløkinum. Tað ber til at fáa ein góðan festivalbúff, eina skjóta pylsu, eina góða pizza og mangt annað.

## Parkering
Fleiri størri parkeringspláss eru í nánd av festivaløkinum, og fólk verða biðin um at parkera bilin forsvarliga á avmerktum parkeringsøkjum. Parkeringspláss eru til dømis við KÍ-høllina, við Skálan, við skúlarnar á Ziskatrøð og við Ósánna, við Beteda og Bókasavnið, við Christianskirkjuna, á Klaksvíksvegnum og aðrastaðni.

## Prísir í forsølu
Vikuskiftispass til Summar Festivalin hava hesar prísir í forsølu á Shell, í Telebúðum og á Teleshop.fo:
3. desember 2008-5. februar 2009: 650,-
6. februar 2009-6. mai 2009: 800,-
7. mai 2009 - 16. juli 2008: 950,-
17- juli 2008 – 6. august 2008: 1050,-
Vikuskiftispass børn 6-12 ár: 200 kr.
Børn 0-5 ár: Ókeypis

## Prísir við dyrnar
Vikuskiftispass: 1050,-
Atgongumerki hósdag: 500,-
Atgongumerki fríggjadag: 600,-
Atgongumerki leygardag: 600,-
Vikuskiftispass børn 6-12 ár: 250 kr.
Børn 0-5 ár: Ókeypis

## Royking
Royking er bannað í Flags-tjaldinum og annars á øllum mat- og sølustøðum á festivaløkinum.

## Rúsevni
Rúsevni eru strangliga bannað á festivaløkinum. Nýtsla av ólógligum rúsevnum verður meldað til løgregluna og hevur við sær burturvísing av festivaløkinum.

## Samarittar
Samarittar frá Reyða Krossi Føroya eru á festivaløkinum.

## Sjúkrahús
Klaksvíkar Sjúkrahús liggur ein kilometur frá festivaløkinum. Sjúkrabilur frá Klaksvíkar Sjúkrahús er eisini til staðar við stóra pallin á festivalinum.

## Skeinking
Øl og vín verður selt á festivaløkinum. Strangt 18 ára aldursmark er fyri keyp av øli og víni, og sølustøðini kunnu biða um prógv fyri aldrinum, halda tey tað verða neyðugt. Tað er ikki loyvt at taka øl ella rúsdrekka við sær inn á festivaløkið, og tað er ikki loyvt at taka øl við sær út av festivaløkinum.

## Tjalding
Tjaldingin á Summarfestivalinum verður skipað saman við Kunnningarstovuni og bóndunum, sum eiga og vara av vakra bønum í Gerðunum í Klaksvík. Øll sum ynskja tjaldingarpláss á Summarfestivalinum kunnu venda sær til Kunningarstovuna, sum í neyvum samstarvi við Andras Joensen, bónda, fáa ávíst hóskandi og egnað økið. Tjaldingin verður í stóran mun skipað eftir aldri og áhugamálum, soleiðis at tey ungu og familjur við børnum ikki nýtast at liggja uppat hvørjum øðrum. Allir tjaldarar, sum virða galdandi reglu fyri tann einstaka og sjálvt tjaldingarøkið, eru hjartaliga vælkomnir á Summarfestivalin!
Meira um tjaldingina á summarfestivalur.fo og kunning.fo

## Náttarbussar
Skipað verður fyri eyka bussambandi á Summar Festivalinum. Strandferðslan koyrir sum vanligt um dagin, og á nátt verða eyka bussar settir inn til teirra, sum vilja sleppa heimaftur. Bussarnir koyra frá parkeringsøkinum við KÍ-høllina. Bussarnir koyra soleiðis:
Hóskvøldið: Kl. 02.30
Fríggjakvøldið: Kl. 04.30
Leygarkvøldið kl. 04.30
Bílegging: 217752

## Trygdarfólk
Summar Festivalurin hevur trygdarfólk á og kring festivaløkið. Trygdarfólkini ganga í serligum búna. Um nakað er áfatt, ber til at venda sær til trygdarfólkini.

## WC
Fleiri toilettvognar verða á festivaløkinum. Sí kort.